## Ógreið tekin av Azorunum

Leiðarin hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum, Hans Blix, segði í gjár, at boðini frá toppfundinum á Azorunum sunnudagin vóru heldur ógreið.

Í samrøðu við svenska sjónvarpið segði Hans Blix, at George W. Bush tosaði mest um, hvussu Irak skal fríast frá Saddam Hussein, og hvussu USA ætlar at tryggja, at Irak ikki hevur nøkur hópoyð-ingarvápn longur. Hinvegin tosaðu Tony Blair og Jose Maria Aznar mest um at geva altjóða samfelagnum enn ein møguleika at standa saman til at geva Saddam Hussein enn ein seinasta møguleika, helt Hans Blix.

Fyri nøkrum døgum síðani ljóðaði, at ST var farið undir at flyta vápnaeftirlitsmenn úr Irak, men tað avsannaði Hans Blix í svenska sjónvarpinum. Hann segði, at allir eftirlitsmenninir eru enn í Irak, men at hann er til reiðar at geva teimum boð um at fara haðani, fær hann boð frá ST um tað. Kortini væntaði hann ikki, at hann fer at fáa hesi boðini beinanvegin.

## Styðja Bush

Teir flestu amerikanararnir taka undir við, at USA skal leypa á Irak, sama hvat ST-trygdarráðið sigur.

Sambært einari kanning hjá sjónvarpinum CNN siga 64 prosent av teimum spurdu amerikanarunum, at Bush forseti sigur at geva boð um álop á Irak, sjálvt um trygdarráðið ikki tekur undir við tí. Fyri fjúrtan døgum síðani søgdu 59 prosent tað sama.

Sama kanning vísir, at nógv teir flestu amerikanar-arnir halda, at samband er millum Irak og yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda, sjálvt um eingi prógv eru fyri tí. Av teimum, sum CNN spurdi, siga 88 prosent, at Irak hevur samband við al-Qaeda og aðrar yvirgangsfelagsskapir, sum hótta við atgerðum at USA. 51 prosent svaraðu, at tey eru sannførd um, at Saddam Hussein visti um atsóknirnar at World Trade Center og Pentagon fyri hálvum øðrum ári síðani.

## Farið úr Kuwait!

Bretska uttanríkisráðið mælti um vikuskiftið øllum bretskum ríkisborgarum í Kuwait til at fara av landinum.

Sambært tíðindastovuni AP umfatar áheitanin allar bretskar ríkisborgarar í Kuwait burtursæð frá diplomatunum á bretsku sendistovuni. Í grundgevingini hjá uttanríkisráðnum stóð, at myndugleikarnir hava tikið avgerðina eftir at hava mett um vandan fyri yvirgangi, og tí at Irak kann fara at nýta evnafrøðilig og lívfrøðiligt vápn fyri at verja seg ímóti álopi.

Uttanríkisráðið í London hevur eisini mælt bretum frá at fara til Ísraels, Vestara Áarbakka og Gaza-geiran, og teir bretarnir, sum eru har, verða bidnir um at fara haðani sum skjótast. Seinni kunngjørdi uttanríkisráðið, at bretar, sum eru í Sameindu Arabisku Emiratunum, eiga eisini at fara haðani.

## Taka diplomatar heim

Uttanríkisráðið í Washington gav sunnudagin sínum diplomatum á sendistovunum í Ísrael, Sýrialandi og Kuwait boð um at koma til USA.

Í boðunum frá uttanríkisráðnum stóð, at tær tríggjar sendistovurnar verða ikki stongdar, men at starvsfólkatalið verður skert mest møguligt. Amerikansku myndugleikarnir siga í boðunum, at viðurskiftini í teimum trimum londunum kunnu ikki metast at vera nóg trygg, tí roknast kann við álopum á amerikanskar sendistovur, brestur kríggj á við Irak.

Undan Flógvakrígnum í 1991 boðsendi USA eisini sínum diplomatum í Ísrael at koma heim. Tað sama var galdandi fyri amerikansku diplomatarnar í Saudiarabia.

# Sannleikans tími komin



*Blair, Aznar og Bush á tíðindafundi aftan á fundin á Azorunum*

**Teir 250.000 amerikansku og bretsku hermenninir við irakska markið bíða nú bert eftir boðum um at leypa á**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

- Í morgin er sannleikans tími hjá øllum heiminum, segði amerikanski forsetin, George W. Bush, eftir fundin á Azorunum við Tony Blair og Jose Maria Aznar sunnudagin. Í gjárkvøldið skuldi hann so boða amerikansku tjóðini frá, hvørja niðurstøðu hann var komin til.

Men í gjár var lítil ivi um, hvønn veg tað bar.

- Hevði eg verið iraki, hevði eg roknað við, at tær fyrstu bumburnar kunnu detta niður av himni nær sum helst og kanska longu í nátt, segði Rosemary Hollis á Royal Institute of Foreign Affairs í London við Reuter í gjár.

Samstundis royndu amerikanskir og bretskir diplomatar av øllum alvi at fáa Frakland og Russland at sleppa ætlanini at nýta sýtingarrættin í ST-trygdarráðnum. Gjáranáttina var einki, sum bendi á, at Frakland var sinnað at slaka fyri tí ógvusliga trýstinum, og eygleiðararnir væntaðu heldur ikki, at Moskva fór at broyta hugsan.

Skuldi tað diplomatiska átakið eydnast, soleiðis at Irak fær eina seinastu freist, verður nneyvan talan um meiri enn nakrar fáar dagar.

Amerikanska sjónvarpsstøðin CNN segði í gjár, at ábendingarnar hjá Bush bendu á, at Saddam Hussein fær 72 tímar til at rýma av landinum. Hetta verður gjørt, so vápnaeftirlitsmenninir hjá ST og útlendsk tíðindafólk fáa stundir til at sleppa sær úr Irak.

So byrjar álopið.

### Lovar aftursvar

Í Bagdad bíðaði Saddam Hussein ikki leingi við sínum viðmerkingum til orðini hjá Bush á Azorunum.

Hvør hevur sett Amerika til tann órættvísa dómaran yvir heiminum, spurdi irakski forsetin.

- Tá fíggindin leggur á okkum, má hann eisini skilja, at kríggið millum hann og okkum verður allastaðni í heiminum, har himmal, jørð og vatn eru, segði Saddam Hussein. Hetta merkir sambært eygleiðarum, at irakski forsetin er til reiðar at gera kríggið við Irak til eitt heimsumfatandi kríggj, og at hann er sinnaður at nýta øll vápn fyri at verja Irak.

Saddam Hussein legði afturat, at Irak hevur ikki tey hópoyðingarvápn, sum amerikanarar og bretar siga landið hava.

- Eru hópoyðingarvápn ein nál, sum kann fjalast í hárbandinum ella turriklæðnum hjá einari gamlari kvinnu, so at vápnaeftirlitsmenninir ikki kunnu finna tey, spurdi Saddam Hussein.

# Kríggj við Irak kann kosta tvær milliónir mannalív

**Eitt kríggj við Irak kann fara at krevja upp ímóti tveimum milliónum mannalív, stendur í einari frágreiðing, sum týska stjórnin hevur gjørt**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Blaðið Tageszeitung hevur fingið fatur á frágreiðingini, sum stóð í blaðnum í gjár.

Í frágreiðingini, sum umhvørvismálaráðið í Berlin hevur gjørt, stendur, at millum 400.000 og tvær milliónir fólk kunnu doyggja av krígnum, annaðhvørt beinleiðis ella óbeinleiðis. Serliga sivilfólkið í býunum er í vanda, tí tað verður trupult at útvega teimum reint vatn og mat.

Í frágreiðingini verður eisini víst á, at fjórðingurin av irakska fólkinum hevur ilt við at fáa nóg mikið av vatni sum er, og at hesin parturin verður munandi størri, brestur kríggj á.



# Vandamikil lungnasjúka hevur kravt níggju mannalív

**Ein smittandi lungnasjúka, sum hevur sín uppruna í Eysturasia, hevur kravt níggju mannalív. Ferðafólk kunnu breiða sjúkuna út um heimin**

SJÚKA
*Árni Joensen:*

Alheims heilsustovnurin WHO ávaraði í síðstu viku um eina higartil ókenda lungnasjúku, sum var farin at gera um seg í Eysturasia, og sum longu hevði kravt fleiri mannalív. Sjúkan varð fyrstu ferð staðfest í Kina í síðsta mánað.

Sambært WHO doyði ein sjúkrasystir í Hanoi í Vietnam av sjúkuni, og nakrar dagar seinni doyði ein amerikanari av sjúkuni. Hildið verður, at hann var vorðin smittaður undir einari vitjan í Hongkong. Í Kanada hava myndugleikarnir illgruna um, at ein kvinna og eitt barn eru deyð av sjúkuni. Eisini tey høvdu verið í Hongkong.

Á Taiwan staðfestu heilsumyndugleikarnir sjúkuna leygardagin, og í Malaysia eru 16 fólk løgd inn á sjúkrahús við sjúkueyðkennum, sum benda á, at eisini tey hava fingið sjúkuna.



*Í Eysturasia royna fólk at verja seg ímóti nýggju sjúkuni. Her eru ferðafólk av Taiwan í floghavnini í Hongkong.*

### Eisini í Evropa

Sunnudagin kunngjørdu heilsumyndugleikarnir í Týsklandi, at eitt fólk, sum var komið við flogfari úr Singapore til Frankfurt, var lagt inn á sjúkrahús, tí illgruni var um, at viðkomandi hevði fingið ta nýggju sjúkuna. Frammanundan var ein lækni, sum hevði verið í sama ferðalagnum, lagdur inn á sjúkrahús. Týsku myndugleikarnir siga, at læknin var á veg úr Singapore á eina læknaráðstevnu í New York, tá hann brádliga gjørdist sjúkur.

Hini umleið 80 fólkini, sum vóru í flogfarinum úr Singapore, hava fingið boð um at halda seg innandura og at boða frá, fáa tey illgruna um, at tey eru sjúk.

Týsku heilsumyndugleikarnir halda tó ikki, at vandi er fyri, at ferðafólkini eru smittað, tí sjúkan smittar bert við tættari hjáveru, sum sagt verður.

# Finnland fær eina kvinnu til stjórnarleiðara

**Miðflokkurin vann finska ríkisdagsvalið, og Anneli Jæetteemæki verður eftir øllum at døma nýggjur stjórnarleiðari**

FINNLAND
*Árni Joensen:*

Frøin var ófør í valhølinum hjá finska Miðflokkinum sunnukvøldið, tá tað var vorðið greitt, at flokkurin var vorðin tann størsti í Ríkisdegnum. Uppteljingin vísti, at Miðflokkurin hevði fingið 55 tinglimir ella tveir fleiri enn Sosialdemokratarnir hjá Paavo Lipponen, forsætisráðharra.

Valið gav Miðflokkinum sjey tinglimir afturat. Framgongdin kom ikki óvart á nakran, og hon var í veruleikanum minni, enn roknað varð við frammanundan. Tí var Paavo Lipponen eisini fegin um úrslitið hjá Sosialdemokratunum, sum fingu eitt betri úrslit, enn veljarakanningarnar høvdu sagt.

Finskir valgranskarar siga, at valið hesaferð snúði seg ikki so nógv um sjálvan politikkin, men heldur um Anneli Jæetteemæki ella Paavo Lipponen. Persónsspurningurin gjørdi eisini, at aðrir flokkar komu at standa í skugganum, og tað kostaði eisini summum teirra dýrt.



*Anneli Jæetteemæki kann gerast fyrsta kvinnan í finska forsætisráðharrastarvinum*

Í Finnlandi er tað vanligt at skipa breiða stjórn, og Miðflokkurin hevur ikki dult fyri, at hann er sinnaður at skipa stjórn saman við sosialdemokratunum. Paavo Lipponen hevur harafturímóti sagt, at hann vil hava eina so breiða stjórn, sum til ber.

Summir valgranskarar í Helsingfors vísa eisini á, at spurningurin um forsætisráðharrasessin kann fáa avgerandi týdning. Anneli Jæetteemæki hevur gjørt greitt, at sum formaður í størsta flokkinum hevur hon fyrsta rætt til sessin sum stjórnarleiðari, men eygleiðarar ivast í, um Pavvo Lipponen er sinnaður at fara í stjórn sum vanligur ráðharri.

## Fimm palestinar doyðu

Fimm palestinar, teirra millum eitt tvey ára gamalt smábarn og ein trettan ára gamal drongur, doyðu, tá ísraelski herurin leyp á flóttafólkaleguna Nuseirat í Gazageiranum gjáranáttina.

Sambært palestinsku sjúkrahúsmyndugleikunum vórðu tólv fólk særd í álopinum. Sagt verður, at ísraelsmenn nýttu umleið 30 hernaðarakfør og gravkýr í álopinum. Áðrenn teir tóku seg aftur, sprongdu hermenninir minst eitt hús í luftina.

Sunnudagin doyði ein amerikansk friðarkvinna, tá hon royndi at steðga einum ísraelskum álopi í Gazageiranum. Tann 23 ára gamla Rachel Corrie, sum var ættað úr Washington, doyði, tá ein ísraelsk gravkúgv koyrdi á hana. Amerikansku myndugleikarnir hava mótmælt hendingini og hava kravt eina frágreiðing frá ísraelsku stjórnini.

## Hann skal loysa Djindjic av

Leiðslan í demokratiska flokkinum í Serbia mælti sunnudagin tjóðartinginum til at velja Zoran Zivkovic til forsætisráðharra eftir Zoran Djindjic, sum varð myrdur í Beograd seinasta mikudag.

Zoran Zivkovic er næstformaður í demokratiska flokkinum, og roknað verður við, at tjóðartingið fer at velja hann til stjórnarleiðara einaferð í hesari vikuni. Zivkovic verður ætlandi eisini formaður í demokratiska flokkinum, til flokkurin fer at velja annan formann á landsfundi í heyst.

Serbisku myndugleikarnir hava tikið meiri enn 300 fólk, sum teir seta í samband við morðið á Zoran Djindjic. Um vikuskiftið ljóðaði, at sjálvur drápsmaðurin var flýddur úr Serbia, og at hann møguliga var á veg til Noregs. Tí varð vaktarhaldið á norska markinum og í norsku floghavnunum styrkt.

## Semja um dómstól

ST og myndugleikarnir í Kambodja eru vorðin samd um at skipa ein dómstól, sum skal viðgera rættarmál ímóti leiðarunum hjá Reyðu Khmerunum, sum eru ákærdir fyri fólkamorð.

Samráðingarnar um at skipa dómstólin hava tikið drúgva tíð, men um vikuskiftið boðaðu kambodisku myndugleikarnir, at teir høvdu góðtikið tað seinasta uppskotið hjá ST. Semjan skal nú leggjast fyri ST-aðalfundin og tjóðartingið í Kambodja til góðkenningar.

Reyðu Khmerarnir sótu við valdið í Kambodja í fýra ár. Hetta var eitt ógvuliga harðrent stýri, og hildið verður, at meiri enn 1,6 millión fólk doyðu av ágangi frá stýrinum hesi árini.

## Bin Laden var í Brasil

Eitt blað í Brasilia skrivaði um vikuskiftið, at yvirgangsmaðurin Osama bin Laden kom úr Argentina til Brasil í 1995, og at hann helt til í brasilska landspartinum Foz de Iguazu nakrar dagar.

Brasilska blaðið sigur seg hava tíðindini frá keldum í landsins fregnartænastu. Tað er alment kent, at fólk á markinum millum Argentina og Brasilia hava veitt yvirgangsfelagsskapum fíggjarligan stuðul, og sambært brasilska blaðnum hava myndugleikarnir tí havt neyvt eftirlit við virkseminum á marknaleiðini síðani atsóknirnar í USA fyri hálvum øðrum ári síðani.

Brasilska blaðið veit eisini at siga, at Khalid Sheikh Muhammed, sum var tikin í Pakistan herfyri, var í Sao Paulo í Brasil í desember í 1995.